90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein

# RUDOLF JOENSEN



FAKTA **RUDOLF**

**Navn:** Rudolf Joensen
**Aldur:** 56 ár
**Bústaður:** Havn
**Starv:** Lærari í skúlanum í Kaldbak

# Rudolf er síðu **89 drongurin**

**Hvussu er lagið?**
Tað er rímiliga gott. Eg eri ikki nakar veðursjúkur harri, og er mann tað í Føroyum, so er mann nokk skeivt plaseraður.

**Hvør er besti sjónleikur, tú hevur sæð?**
Eg havi sæð nógvar góðar leikir her í Føroyum. Mær hevur altíð dámt væl leikir hjá Dario Fo, og ein av teimum, sum eg var sera glaður fyri í sínari tíð, var »Vit eiga ikki eitt oyra, vit lata ikki eitt oyra«. Mær dámdi eisini sera væl leikin hjá Jóanes Nielsen, »Eitur nakað land Week-end?«

**Hvør er tín dreyma leiklutur?**
Eg havi ikki havt nakrar stórar høvuðsleiklutir, og onkur kallaði meg síðu 89 drongurin, tí eg kom ofta seint inn í leikirnar. Men tað seinastu løtuna, tá eg spældi við, so var tað ofta rokmikið. Um eg skuldi ynskt mær ein leiklut, so skuldi tað verið í einum filmi hjá Woody Allen – mær dámar væl handan jødiska forvirringin í New York umhvørvinum.

**Hvør er Føroya besti leikari?**
Vit hava nógvar góðar leikarar, og mær dámar ikki orðið »best«. Men ein, sum altíð imponerar meg, er Hans Tórgarð.

**Hvat er tað besta við at búgva í Føroyum?**
Tað er so deiliga lítið skil á í Føroyum. Mann følir seg ikki trýstan av systeminum.

**Hvat er tað ringasta við at búgva í Føroyum?**
Tað er so lítið skil á, at vit rudda ongantíð upp. Alt flýtur, og ein høvuðsreingerð hevði verið upp á pláss.

## Hvussu er at verða kendur í Føroyum?
Eg veit ikki, um eg eri so kendur. Og tað er í øllum førum ikki so belastandi at verða kendur fyri at stýra einum bingospæli. Tað er til at liva við.

**Hevur tú nakrantíð vunnið í Gekkinum?**
Eg havi spælt við eitt sindur Gekk, men eg havi ongantíð vunnið. Einferð ringdi eg inn fyri eina damu, sum ikki tordi at ringja, men eg hevði ikki vunnið sjálvur.

**Hvør er mest inspirerandi persónur, tú hevur hitt?**
Eg havi hitt nógvar inspirerandi persónar. Ein tann mest áhugaverdi er Jákup Veyhe – hansara verð er ikki á okkara mjólkavegi.

**Hvat heldur tú, tað verður ov lítið tosa um?**
Tann vanliga føroyingin á gólvinum. Men annars vil eg siga, at føryingar snakka meira um alt millum himmal og jørð, enn vit plagdu at gera.

**Hvat verður ov nógv tosa um?**
Facebook.

**Hvat er størsti brølarin, sum er gjørdur í Føroyum?**
Hin yvirfylta fiskidagaskipanin.

**Hvat ger teg glaðan?**
Tá tingini – sum tað eitur á góðum føroyskum – fløska seg.

**Hvat ger teg illan?**
Eg kann blívur illur um ymiskt, men kanska eri eg blivin eitt sindur meira líkaglaður við árum. Eitt aktuelt mál, sum kann øsa meg, er, at føroyingar jagstra eitt burðardygt stempul í Bretlandi, í staðin fyri at gera fiskiskapin burðardyggan.

**Hvør er tín lívrættur?**
Trupulleikin í mínum lívi hevur verið, at næstan alt er lívrættur – serliga allur føroyskur matur.

**Hvat hevði tú gjørt, um tú var ósjónligur ein dag?**
Set meg í tað sokallaða føroyska uttanríkisráðið.

**Um tú slapp at liva lívið umaftur, hvat hevði tú gjørt øðrvísi?**
Nógv hevði verið øðrvísi, um mann ikki tók tann fyrsta snapsin. Har vóru nøkur ár, har eg kundi fingið meira við av tí heila.

**Hvat er eitt gott lív?**
At hava rímiligan sálarfrið.

**Hvat hevur lívið lært teg?**
Lívið hevur lært meg, at tað gongur skjótt fyri seg. Tað ræður um at njóta lívið ein dag í senn.

**Nær veit mann, at mann er ein klaksvíkingur?**
Tá mann er limur í felagsskapinum Orginalar.